# TÓNLEIKASØGULIGIR SPURDÓMAR Í FØROYSKUM SKÚLAHØPI

Knút Háberg Eysturstein
Ph.d lesandi í tónleiki

Fróðskaparsetur Føroya

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Vísinda vøka

# EIN SPURNINGUR

Hvat eyðkennir eina blómandi tónleikamentan?

- Professionell (yrkistónleikarar) og amatørar (áhugafólk)

- Leikluturin hjá tónleikaútbúgving

- Týdningurin av siðbundnum tónleiki

- Týdningurin av søguligari gransking

# PH.D. VERKÆTLAN

**Hvussu siðvenjufatanir verða tingaðar í námsætlanum í tónleikaútbúgvingarligum høpi**

- Hugtakið um tað føroyska í tónleiki, t.e. leikluturin hjá siðvenjufatanum og samleika
- Hvussu tónleikaútbúgving verður útint í føroysku útbúgvingarskipanini (Fólkaskúlin)

# PH.D. VERKÆTLAN

**Verkætlanin er býtt í tveir partar**
- Ein ástøðiligur partur við konseptuella kortinum yvir verkætlanina, inkl. lyklayrkisorð, hugtøk/konsept og ástøði, ið verður lýst gjølla í eini bókmentameting (literature review) og í einum kapitli um háttalag (method)

- Ein dátuinnsavningarpartur við A) vitjanum á viðkomandi skjalasøvnum til tess at fremja søguliga dokument analysu, og B) kvalitativum samrøðum við lærarar v.fl. um evni innan tingingar millum siðbundnan tónleik og samtíðar tilgongdir til tónleikaundirvísing og praksis

# SØGULIG SANNINDI

Avbjóðingar og trupulleikar við at eyðmerkja søguna hjá siðbundnum vokaltónleiki í Føroyum

Siðbundin sangur hevur verið ein regluligur partur av føroyska samfelagnum í øldir

Avmarkaðar keldur finnast um evnið siðbundin sangur sæð úr tónleikaligum sjónarhorni

# LUTTAKANDI FRAMFØRSLA

“Briefly defined, *participatory performance* is a special type of artistic practice in which there are no artist-audience distinctions, only participants and potential participants performing different roles, and the primary goal is to involve the maximum number of people in some performance role. *Presentational performance*, in contrast, refers to situations where one group of people, the artists, prepare and provide music for another group, the audience, who do not participate in making the music or dancing.”

-Turino, Thomas. 2008. *Music as Social Life: The Politics of Participation*, Chicago: The University of Chicago Press.

# FØROYSK TÓNLEIKASØGA

## Søguliga gongdin í Føroyum

- Siðbundin vokaltónleikur (frá miðøld til uml. 1900)
- Instrumentalur tónleikur (uml. 1900 til í dag)

Frá uml. 1850 til 1950 gerast ljóðføri meira vanlig í Føroyum

## Føroyskur tónleikur áðrenn 1900

Føroyskur dansur

- kvæði
- vísur
- tættir

Dansispøl og sangspøl

Kingosangur

Skjaldur

# ELSTU KELDUR UM FØROYSKAN DANS

Thomas Tarnovius (1669) og Lucas Debes (1673) niðurskriva elstu varðveittu og útgivnu lýsingar av fólkum, ið dansa føroyskan dans

Jens Christian Svabo (1746-1824), føroyskur málgranskari, lýsir dansin í síni frásøgn frá 1781-1782


Indberetninger,
indhentede
paa en,
Allernaadigst befalet,
Reise i Færøe
i Aarene 1781 og 1782
ved
Jens Kristian Svabo.

I. Hefte.

Jens Christian Svabo, ferðafrásøgn úr Føroyum 1781-1782



"Dans i en røgstue på Færøerne" eftir Axel Emil Krause (1905)

Knút Háberg Eysturstein, NÁD

# FELAGSSANGUR

Felagssangur uttanfyri kirkju og dansistovu gerst siðvenja í 20. øld

Morgunsangur og annar sangur í skúlanum hevur havt týdning fyri felagssangin

Felagssangur er eitt slag av luttakandi framførslu og hevur hetta aspektið í felag við føroyska dansin

# FØROYSKUR DANSUR Í 20. ØLD

Eftir Seinna veraldarbardaga verður dansurin varðveittur undir formligum viðurskiftum

Í 1952 verður fyrsta dansifelagið *Dansifelagið í Havn* stovnað

Í 1978 verður fyrsta landsfevnandi felagið *Sláið Ring* stovnað

Í nútíðarsamfelagnum hava vit tey serkønu innan dans og so almenningin




Plátuhúsi (Hansemann Tórgarð, 1984)

# MIDNÁTTARSANGUR Á ÓLAVSØKU - VIÐ FØROYSKUM DANSI AFTANÁ



Mynd: travelbloggerindonesia.com



Mynd: local.fo

# FØROYSKUR DANSUR Í SKÚLANUM

1920-árini: politikarar og mentafólk skjóta upp at føroyskur dansur og kvæði koma innum skúlagátt

1920-árini til 1990-árini: føroyskur dansur er ein óformligur partur av skúladegnum í summum skúlum

1997: føroyskur dansur formelt inkluderaður í námsætlanini við lóg



Mynd: tvoroyrarskuli.fo (2021)

# STØÐAN Í DAG
# - SIÐVENJUR OG NÁMSÆTLANIR

Hvørki føroyskur dansur ella felagssangur hoyra burturav til námsætlanina hjá einstakari lærugrein í fólkaskúlanum

Føroyskur dansur/kvæði eru nevnd í námsætlanini fyri lærugreinarnar Tónleikur og Føroyskt

Í Fólkaskúlalógini verður álagt, at "Morgunsangur eigur at vera partur av vanliga skúladegnum" (logir.fo)

1. august 2024 kom undirvísingarevnið *Kvæðamentan, kvøðing og føroyskur dansur* í gildi sum kravt undirvísingarevni í føroyska fólkaskúlanum

# HVAT EYÐKENNIR EINA BLÓMANDI TÓNLEIKAMENTAN?

- Siðbundni vokaltónleikurin er ein sera týðandi partur av blómandi føroysku tónleikamentanini
- Føroyski dansurin er eitt slag av luttakandi framførslu – frá byrjan er ongin munur á listafólkum og áhoyrarum, har eru bert luttakarar og møguligir luttakarar
- Ein stakgóð uppseting til tónleikafrálæru, sum eisini hevur møguleika at byggja brýr millum yrkistónleikarar og áhugafólk
- Føroyski dansurin er eisini ein frálík søga – ein grundleggjandi søga í føroysku tónleikamentanini



Janus Kamban: Dansiringurin (1956)